# Dimmalætting

Fríggjadagur

Nr. 46 • 120. árgangur • 7. mars 1997 • Tlf. 11212 • Fax 10941

– ÁLÍTANDI TÍÐINDI

7 kr.



»Úr Luftini«
við SV- og ÚF-skránni
Í BLAÐNUM Í DAG


# Fáa alment oljufelag

**Edmund Joensen løgmaður hevur fingið undirtøku frá samgongufeløgum sínum fyri at seta eina nevnd at kanna, hvussu eitt føroyskt alment oljufelag skal virka. Breið semja er í landsstýrinum, og hetta verður gjørt eftir tilmæli frá Oljuráðleggingarnevndini.**

Georg L. Petersen

Á oljuráðstevnuni í Norðurlandahúsinum hevur verið borið upp á mál, at rættast hevði verið at fingið eitt alment føroyskt oljufelag upp í leikin, tá vit fara at spinna gull upp á svørtu droparnar.

Longu mánadagin í hesi vikuni fekk løgmaður undirtøku fyri at seta eina nevnd at kanna, hvussu hetta kann skipast.

– Mánadagin legði Oljuráðleggingarnevndin eina tilráðing fyri landsstýrið. Mælt varð til, at um politisk undirtøka var fyri tí, átti landsstýrið at seta eina nevnd at kanna møguleikarnar, sigur løgmaður, Edmund Joensen.

Og longu sama dag mælti løgmaður til, at nevnd varð sett, og hetta fekk breiða undirtøku í samgonguni.

– Eg havi sjálvur allatíðina verið av tí fatan, at vit máttu hava eitt alment oljufelag at byrja við. Tá virksemið síðan er komið í gongd, kunnu partabrøv seljast privatum, sigur Edmund Joensen løgmaður.

Tað, sum gevur landsstýrinum ein møguleika at fáa eitt alment oljufelag upp í oljuboringarnar er, at rættindini eru á føroyskum hondum.

Tað ber til at siga, at føroyska oljufelagið kemur at minna um norska Statoil.

– Tveir møguleikar eru at vinna nakað úr oljuvinnuni. Annar er ein vanlig skipan, sum gevur inntøkur av avleiddum virksemi. Hin er, sum t.d. verður gjørt í Noregi, at eitt alment oljufelag kemur afturat, sum fær ávísan prosentpart av tí, sum kemur burturúr, sigur løgmaður.

Tað er, tá borirættindini verða bjóðað út, at treytirnar skulu setast í útbjóðingartilfarið. Har kann eitt føroyskt oljufelag fáa sersømdir. Nevndin, sum verður sett, skal kunna fara inn í eitt tætt samskifti við oljuumsitingina/oljuráðleggingarnevndina um møguligar licenstreytir, viðvíkjandi einum almennum føroyskum oljufelag.

Mynd: Kalmar Lindenskov



# Ein skúli fyri øll – eisini menningartarnað

**Teodor Esmar Hansen gongur í 10. flokki. Nógv av tíðini eru hann og stuðulslærarin burtur frá flokkinum. – Er skúlin fyri øll? spyr mamma hansara, Elinita Hansen.**

Katrin Petersen

At Teodor Esmar ikki kann fylgja við í øllum tímum, veit mamma hansara væl. Men hon er ikki heilt nøgd við tað undirvísing, sonur hennara fær.

– Eg haldi ikki, hann hevur nóg nógvar stuðulstímar. Hann hevur brúk fyri stuðli til allar tímar, sigur Elinita Hansen úr Kollafirði.

Sum er, fær Teodor Esmar stuðul 24 av 33 tímum um vikuna. Elinita Hansen hevði eisini ynskt, at undirvísingin á Oyrabakka varð meira lagað eftir tørvinum hjá soni hennara.

– Vit vilja ikki hava integratión fyri ein hvønn prís. Eg veit, at fólkaskúlin ger hvat hann kann, men tað kundi verið betri. Hann hevur brúk fyri at læra at klára seg í samfelagnum. Skúlin er so bókliga innrættaður, har klárar hann jú ikki at fylgja við.

Teodor Esmar er nógv uttan fyri flokkin. Hann og stuðulslærarin brúka nógv av tíðini tveireinir.

– Integratión er bara eitt hugtak. Tú kanst integrera handikappað í skúlan, men tað er ikki vist, at tú kann integrera tey í flokkin. Ikki í øllum samanhangum, sigur stuðulslærarin hjá Teodor Esmari, Heri Jakobsen.

Alternativið er at senda Teodor Esmar á serskúla. Men í Føroyum eru smáir møguleikar hjá menningartarnaðum at fáa skúlagongd eftir fólkaskúlan.

– Her er ongin eftirskúli ella møguleiki fyri útbúgving. Tað er tann størsti trupulleikin, sigur Elinita Hansen.

Hon hevur søkt um, at Teodor Esmar sleppur at ganga eitt ár afturat á felagsskúlanum á Oyrabakka.


Heimatíðindi, síða 3




Tá sløkkiligið kom, stóð eldurin upp úr takinum. Sløkkiliðsfólk og grannar royndu at bjarga innbúgvi undan eldinum Mynd: Hilmar Jan

# Eldurin tók heimið sjálvan brúdleypsdagin

**– Hetta er júst brúdleypsdagur okkara og hvørgin okkara hevði væntað at ein so dapur hending skuldi raka okkum ein slíkan dag, segði Byrgi Petersen eftir hendingina í gjár.**

Eli Guttesen

Fyrrapartin í gjár kom eldur í húsini hjá Byrgi og Randi Petersen í Fútalág. Boðað var frá eldinum og sløkkiliðið var skjótt á staðnum. Farið var beinanvegin undir at bjarga øllum sum bjargast kundi úr húsinum.

Eitt lítið úthús stóð undir altanuni í einum skoti eystanfyri húsini. Børn plaga at spæla í húsinum og alt bendir á at tað er har eldurin er kyknaður.

Húsini vóru útvið tredivu ára gomul og eru illa farin, serliga loftshæddin var illa brend. Eingin fólk vóru inni tá eldurin kyknaði.


Heimatíðindi, síða 4


## Í BLAÐNUM Í DAG



### Framtíð er í pelagiskum fiski

Við góðum sambandi í uttanríkisráðnum kunnu føroyingar fáa lættari atgongd til eystureuropeisku londini og marknaðin har. Londini eystanfyri eru eldhugaði at gerast limir í ES og vestureuropa er sinnað at fáa tey við, tí markaðarmoguleikarnir metast stórir í framtíðini. Orðini eigur danski uttanríkisráðharrin Niels Helveg Petersen, sum fór aftur til Danmarkar í gjár.


Heimatíðindi, síða 7


### Bert veðurlagið heldur nú vindorkuni hjá SEV aftur

Vindur kann eisini tarna ætlanum um mylnur. Tað er hent í Føroyum, og hetta er nú sambært SEV-stjóranum einasta forðingin fyri, at vindorkan kann útbyggjast í Føroyum. Eitt felag sum skuldi royndarkoyra mylnur í Føroyum, bakkaði m. a. av hesi orsøk. Men peningaliga er ikki langt á mál.


Heimatíðindi, síða 3


### Fiskirannsóknarstovan mælir til gluggameskar í trolposanum

Gluggameskar er avgjørt nakað, sum eigur at vera tikið við, tá hugsað verður um at skilja tann smáa fiskin frá á botni. Gluggameskar fiska bara fisk, sum kemur til holdar og tí verður næstan einki útblakað.


Heimatíðindi, síða 4




### Eitt barnalík aftrat funnið í Belgia

Mikukvøldið kom løgreglan fram á enn eitt barnalík í Belgia, har ein 33 ára gamal maður hevur játtað seg sekan í brotsgerðini. Í gjáramorgunin savnaðust fólk á staðnum, millum teirra henda kvinnan, sum vísir fram eina mynd av deyðu gentuni.


Uttanlandstíðindi, síða 8







